## Tvær umsóknir um eykajáttan

**8,3 milliónir eyka mugu játtast á kontuni til almannamál. Aðru eykajáttanina kann Løgtingið takka sær sjálvum fyri, tí tað noktaði at seta lógina um uppihaldspening úr gildi**

LØGTINGIÐ
*Ingi Ramsussen*

Fíggjarnevndin hjá Løgtinginum hevur fingið tvær umsóknir til eykajáttan. Báðar koma frá landsstýrismanninum við almannamálum, Páll á Reynatúgvu.

Ta einu eykajáttanini kann Løgtingið takka sær sjálvum fyri. Løgtingið sýtti nevniliga fyri at seta úr gildi lógina um uppihaldspening. Tað vísti seg at vera trupult at fáa undirtøku í sjálvari samgonguni, og tí tók Páll á Reynatúgvu uppskotið aftur.

Nú noyðist hann aftur fyri at biða um 7,8 milliónir krónur. Málið hevur skund, tí avgerð um stuðul til uppihaldspening, tað er stuðul til teirra, ið gjalda barnapening, verður tikin í juni mánað, og eingin peningur er settur av til endamálið.

Hin eykajáttanin snýr seg um at veita pening til børn við atferðartrupulleikum. Biðið verður um 500.000 krónur til Rókina á Argjum, tí ein royndarskipan við einum bútilboði til ung millum 14 og 18 ár byrjaði fyrst í árinum. Bútilboðið er skipað sum ein samdøgurstovnur, sum umsitingarliga liggur undir Rókini. Rókin er samdøgurstovnur fyri børn við atferðartrupulleikum.

Rókin hevur seinastu árini havt eitt avlop, men grundað á nýggjan leigusáttmála og krøv frá Arbeiðseftirlitinum verður onki avlop til nýggju verkætlanina.

# Tann góði skúlin byrjar við ársverki

**Hóast Lærarafelagið hevur mótmælt, hevur Høgni Hoydal sett eina skipan við ársverkum í verk fyri fólkaskúlan frá komandi skúlaári. Tað er ein liður í at menna tann føroyska skúlan, sigur hann. Skipanin verður liðilig við einum árstímatali, sum ikki er býtt upp í serstakar partar**


*Einstaki skúlin skal kunna skipan sítt virksemi uttan at vera ov fast bundin at staklutum, segði Høgni Hoydal á tíðindafundi fríggjamorgunin, tá hann greiddi frá skipanini við ársverkum í fólkaskúlanum*

Mynd: Jens K. Vang

FÓLKASKÚLIN
*Ingi Rasmussen*

Frá 1. august verður ein nýggj skipan við arbeiðstíðini hjá fólkaskúlalærarum sett í verk. Farið verður frá skipanini við skemalegging sum høvuðsamboð til eina skipan við eini virksemisætlan fyri árið.

– Endamálið er at fáa eina liðiligari skipan, har ábyrgdin verður flutt út á skúlarnar. Skúlastjórin og einstaki lærarin leggja eina ætlan í felag fyri komandi árið. Farið verður frá einari sentralstýrdari skipan til eina skipan, har skúlin leggur alt til rættis innan fyri nakrar ásettar karmar, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður við mentamálum.

Broytingin kemur ítøkiliga til sjóndar við, at farið verður yvir til ársverk fyri lærarar, har hvør lærari fær eitt árstímatal at arbeiða eftir.

### Egintíð og skúlatíð

Ársverkið hjá einum lærara, sum arbeiðir fulla tíð, er gjørt upp til 1.800 tímar, tá frítíð og annað er trekt frá. Arbeiðstíðin verður býtt upp í tveir partar: Egintíð og arbeiðstíð.

Egintíðin er gjørd upp til 540 tímar, og hesari tíðini ræður lærarin yvir sjálvur. Hesa tíðina kann lærarin brúka til at ráðleggja, fyrireika og eftirmeta sína undirvísing, gera ársætlanir og samskifta við foreldur uttan fyri skúlatíðina.

Skúlatíðin fatar um allar uppgávur lærarans, sum ikki eru partur av egintíðini. Partur av skúlatíðini eru eitt nú felags ráðlegging, floksundirvísing, bólka- og valbólkaundirvísing, steðgir og fríkorter, lærarasamstarv og annað.

Skúlastjórin og lærarin leggja virksemisætlanina í felag, og lærarin fær eitt uppskot minst fýra vikur áðrenn skúlaárið byrjar, so hann fær rættað møgulig mistøk.

### Lærarar mótmæla

Høgni Hoydal hevur tikið avgerðina um, at farast skal yvir til ársverk frá komandi skúlaári. Tað hevur ikki verið uttan svørðslag, tí Føroya lærarafelag sigur seg ikki taka undir við tí leisti, sum er skorin.

Uppskotið hevur verið til frumatkvøðu í Føroya lærarafelag, og limirnir vrakaðu ætlanina, hóast umboð fyri felagið sótu í nevndini, sum gjørdi uppskotið. Atkvøðugreiðslan førdi til, at felagið ikki kundi taka undir við ætlanini kortini.

Alt byrjaði í grundini longu í 1997, tá ein semja varð gjørd um, at arbeiðstíðin skuldi skipast sum ársverk, tí verandi skipan er ov stirvin til nýggju fólkaskúlalógina. Aftur í 2000 varð ein semja gjørd, har ein arbeiðsbólkur varð settur. Í tí semjuni varð samstundis staðfest, at landsstýrismaðurin kann áseta arbeiðstíðina, um partarnir ikki semjast.

– Eg havi tikið avgerð um at seta skipanina í verk, tí hetta er eitt ótrúliga neyðugt amboð til gagns fyri allar skúlar og lærarar. Eg skilji ikki rættiliga, hví tað var sent út til frumatkvøðu, tí vit hava ikki fingið roynt hana enn, og um vit onki gera nú, so kunnu vit halda fram at brúka næstu árini at berjast um smálutir. Hetta er ein roynd, har tvey tey fyrstu árini vera royndarár. Arbeiðsbólkurin fylgir við gongdini og kann gera neyðugar tillagingar, um tað verður neyðugt, sigur Høgni Hoydal.

### Til fjals og í fjøru

Broytingin er ein liður í at menna tann góða skúlan, sigur Høgni Hoydal. Einstaki skúlin skal kunna skipa sítt virksemi uttan at vera ov fast bundin at staklutum. Lærarin skal fáa høvi at átaka sær skiftandi uppgávur sum ein sjálvsagdan part av arbeiðnum í skúlanum.

Skipanin hevur verið nýtt í Danmark í nøkur ár, og hóast tað ikki hevur verið upp á tal at venda aftur til gomlu skipanina, so hava atfinningar verið frammi. Eitt nú at hon leggur lærarar í eina spennitroyggju. Men sambært Høgna Hoydal hendir júst tað øvugta við føroysku skipanini.

– Hetta er eitt plagg til fólkaskúlan. Hvør einstakur skúli kann sjálvur binda og laga tað eftir egnum ynski. Vit fara burtur frá miðstýringini. Eftir hesum er líka mikið, um undirvísingin fer fram í fjørðuni, í skúlastovuni ella í haganum. Lærarin fær betri tíð at vera saman við næminginum og taka sær av serligum tørvi, sigur Høgni Hoydal.

# Høgni Hoydal ræðist ikki rættarmál

**National trygd og ein roynd at varðveita lóggávuvald eru grundgevingar hjá Høgni Hoydal fyri, at hann gjørdi eina kunngerð, sum helst stegðar nýggju Gjaldskipanini hjá peningastovnunum. Skuldu peningastovnarnir stevnt landsstýrinum, so tekur hann tað við sálarró, tí hann heldur seg hava rættin á sínari síðu**

PERSÓNSUPPLÝSING
*Ingi Rasmussen*

Tað brýtir í bæði borð hjá Høgna Hoydal, landsstýrismanni við lógarmálum.

Øðrumegin undrast tingmenn á, at Høgni Hoydal tók málið um vernd av persónsupplýsingum úr teirra hondum. Og hinumegin hótta peningastovnarnir við at leggja sak ímóti landsstýrinum, tí ein kunngerð frá 16. juni steðgar teirra nýggju Gjaldskipan. Høgni Hoydal sigur sjálvur, at hann fekk ikki handlað øðrvísi.

– Eg noyddist at binda um heilan fingur. Tá tingið ikki vildi taka støðu, so mátti eg lýsa eina kunngerð, sum útgreinar lógina. Lógin sigur púra greitt, at landsstýrismaðurin skal orða eina kunngerð, sum skal forða fyri, at persónsupplýsingar fara av landinum, og tí noyddist eg rætt og slætt at gera soleiðis, sigur Høgni Hoydal.

### Nóg góða tíð

Løgtingið hevði annars málið um hendi, men tað strandaði í Rættarnevndini, sum ikki kláraði at taka støðu. Nú gjørdist málið akutt, sigur Høgni Hoydal, tí Gjaldstovan og onnur skuldu taka støðu til, hvørja skipan, tey skuldu hava, og tí noyddist hann at skera ígjøgnum, sigur hann.

Í blaðnum í gjár segði Jógvan á Lakjuni, formaður í Rættarnevndini, at nevndini tørvaði betri stundir at viðgera prinsipiella málið til lítar, men tað er møsn, heldur landsstýrismaðurin.

– Tingið hevur sjáldan fingið betri stundir til eitt mál. Um tríggir mánaðir ikki eru nóg mikið, so hevur løgtingið ongantíð nóg góða tíð at viðgera eitt mál. Tað hevur eydnast peningastovnunum at gera eitt so mikið gott lobbyarbeiði, at tingmen føldu seg kroystar, men vit mugu halda okkum til lógina, sigur Høgni Hoydal, sum leggur dent á, at bæði løgmaður og landsstýri vóru kunnað um, at kunngerðin fór at koma.

### Klárur til rættin

Peningastovnarnir hava hótt við rættarmáli og endurgjaldskravi, um Gjaldskipanin, sum teir hava brúkt nógva orku og pengar uppá, nú verður steðgað.

– Eg eri til reiðar at fara í rættin, um tað verður neyðugt. Eg ivist ikki í, at vit hava rættin á okkara síðu, tí eg havi bara gjørt, sum lógin áleggur mær. Orðarætt! Eg hevði onki annað val, um vit skuldu varðveita lóggávumyndugleikan á økinum, tí lógin sigur, at tað er ikki loyvt at flyta heilar edv-skipanir av landinum, sigur Høgni Hoydal.

### Nationalur tryggleiki

Fyri hansara viðkomandi snýr tað seg um nationalan tryggleika.

– Tann føroyski lóggávumyndugleikin á økinum má tryggja, at lóggávan verður hildin. Hetta snýr seg um at varðveita lóggávuvald í Føroyum. Gongur hetta, so gongur alt, sigur Høgni Hoydal.

Ført hevur verið fram, at mest sum allir stovnar og fyritøkur, sum hava umrøtt kunngerðina, tá hon var til hoyringar, mæltu frá at seta hana í gildi. Høgni Hoydal sigur, at hædd varð tikin fyri mest sum øllum teimum viðmerkingum, sum komu inn, og at lógin í grundini er linkað við kunngerðini. Eitt nú eru FR- og VISA kort undantikin.

– Tað snýr seg rætt og slætt um, at flytingar, sum fara fram í Føroyum, frá mær til tín ella millum stovnar og fyritøkur her heima, skulu viðgerast í skipanum í Føroyum. Er tað flutningur uttanlands, so er støðan ein onnur, sigur Høgni Hoydal.



# Uppdagarin úr Amerika

**– Tað er umráðandi fyri meg at knýta vinabond og fáa nýggjar vinir, har eg ferðist, og ikki bara fylgja við einum ferðaleiðara allatíðina, sigur 22 ára gamli amerikanarin Nathaniel Reinartz, sum í hesum døgum arbeiðir umborð á sluppini Norðlýsinum**


*Nathaniel Reinartz úr USA arbeiðir í hesum døgum umborð á Norðlýsinum. Hóast hann ongantíð hevur siglt nakað serliga í lívinum, dámar honum væl at sigla*

Mynd: Jens Kr. Vang

FERÐING
*Stefan í Skorini*

– Fyri tveimum árum síðani sá eg Hetland á landkortinum, og so tók eg bara avgerð um at fara hagar, sigur Nathaniel, sum situr í morreyðari troyggju og gummistivlum umborð á Norðlýsinum. Hann hevur sítt hár við einari ella tveimum flættum. Hann líkist einum náttúrumenniskja í orðsins rætta týdningi.

Hann er nú endaður í Føroyum og arbeiðir umborð á Norðlýsinum. Hvønn morgun fer hann út saman við Birgiri Enni og restini av manningini við útlendskum ferðafólki og føroyingum, sum við slupp vilja at skoða Føroya land frá einum øðrum sjónarhorni enn vanligt.

Nathaniel Reinartz er ein ævintýrhugaður unglingi úr býnum Milwaukee í statinum Michigan norðanfyri í USA. Honum dámar væl at ferðast á ein øðrvísi hátt enn tey flestu, og hetta er aðru ferð, at hann ferðast á hesum leiðunum.

– Mær tørvar náttúruna í mínum lívi, og tí velji eg at ferðast á henda hátt. Tá eg eri úti við Norðlýsinum og komi til eitt nýtt stað, kennist tað sum um at eg sjálvur havi funnið júst hendan blettin á jørðini, hóast fleiri túsund menniskju longu hava verið her, greiðir Nathaniel frá.

### Dámar hendan partin av heiminum

Fyrru ferð, Nathaniel var á hesum leiðum, fór hann til Skotlands, haðani hann tumlaði norðureftir til Orknoyggjar og Hetland, har hann steðgaði í tveir mánaðir. Eisini vitjaði hann fleiri av teimum skotsku oyggjunum á tí ferðini.

– Eg havi nógvar vinir í Hetlandi og tað kennist í veruleikanum sum eitt heim hjá mær, sigur Nathaniel um tíðina í Hetlandi, har hann arbeiddi sum smiður eina tíð. Síðani fór hann heimaftur at læra til smið, men honum longdist aftur hendavegin.

– Mær dámar væl at hetta hornið av heiminum, og tí gjørdi eg av at fara enn ein túr, sigur hann. Á næstu ferðini arbeiddi hann á einum bóndagarði á oynni Foula (Fugloy) í Hetlandi. Har búgva 28 fólk.

Ein dagin sá Nathaniel ein fremmandan bát liggja við bryggju, og hann fór at fregnast, hvagar hesin bátur var á veg. Tað vísti seg, at hetta var ein belgi, sum var á ávegis til Føroyar. Nathaniel ivaðist ikki, men spurdi um hann ikki kundi sleppa við, og tað var gamaní.


*– Tá eg eri úti við Norðlýsinum og komi til eitt nýtt stað, kennist tað sum um at eg sjálvur havi funnið júst hendan blettin á jørðini, hóast fleiri túsund menniskju longu hava verið her, sigur Nathaniel*

MYND: Jan Müller

### Verkfallið órógvaði

Hann royndi at fáa arbeiði her, men hetta vísti seg at vera torført, tí verkfall var. Men síðani møtti hann Birgiri Enni ígjøgnum Werner Hentze úr Vestmanna. Hann slapp so umborð á Norðlýsið at arbeiða, har hann eisini búleikast.

Hesuferð ferðast Nathaniel einsamallur, men hann kennir seg ikki einsamallan umborð á Norðlýsinum.

– Her er alt annað enn einsligt umborð. Her hendir allatíðina okkurt, og fólk eru næstan altíð umborð, sigur Nathaniel, sum er sera takksamur fyri at hava fingið hendan møguleikan.

– Birgir plagar at koma trampandi niður í lugarið klokkan átta um morgunin, og hann rópar »get up you crazy american«, sigur Nathaniel flennandi.

Hóast Nathaniel líkist einum garvaðum sjómanni, so er hann als ikki vanur at ferðast á sjónum.

– Mær dámar væl at sigla, hóast eg als ikki eri vanur við slíkt. Hetta er ein góður máti at ferðast, sigur hann.

### Øðrvísi ferðamaður

– Mær dámar ikki at standa uttanfyri og hyggja inn. Eg vil koma í samband við fólk og knýta vinabond við fólkið. Eg havi longu fingið fleiri vinir her í Føroyum, sum eg kann tosa við um lívsins viðurskifti og ikki bara um munin millum USA og Føroyar. Eg sigi ikki, at hesin mátin er betri enn nakar annar máti at ferðast, men hetta dámar mær best, sigur Nathaniel.

Hann hevur ætlanir um at fara víðari til Íslands, men honum dámar so væl í Føroyum, at henn steðgar helst nakrar dagar afturat. Hann ætlar sær at fáa fart við onkrum báti, sum fer víðari til Íslands. Nathaniel hevur longu fingið okkurt tilboð um at koma við til Íslands við onkrum lítlum báti, men hevur ikki tikið av enn.

Hann fer heimaftur til Milwaukee í oktober, men fer møguliga ein túr til Noregs áðrenn.

Nathaniel hevur annars ferðast nógv hesi seinastu árini. Hann hevur tumlað nógv runt í USA og Kanada, og var eisini ein súkklutúr framvið Mississippi ánni. Eisini arbeiddi hann saman við eini vinkonu í einari plantasju í Trinidad í Karibiska havinum.

– Tá eg ferðist skrivi eg nógv brøv, sum eg sendi heim til vinir og familju. Eisini skrivi eg onkuntíð dagbók. Soleiðis viðgeri eg allar upplivingarnar gjøgnum dagin, sigur Nathaniel at enda.

## HB skal til Litava

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Føroyska meistaraliðið HB skal spæla ímóti litaviska liðnum FBK Kaunas í undanumfarinum til Champions League.

Fyrri dysturin verður á Tórsvølli tann mikudagin 16. juli, og seinni dysturin í Litava tann 23. juli. Lutakastið var fríggjadagin á middegi.

Um HB vinnur á Kaunas, skal føroyska liðið møta skotska liðnum Celtic, sum var í UEFA Cup finaluni fyrr í ár.

Eisini varð gjørt av fríggjadagin, hvørjum NSÍ og KÍ skuldu spæla ímóti í UEFA Cup, men hetta lutakastið var eftir evstamark hjá blaðnum.